# Føroya Symfoniorkestur

Ársroknskapur 2017

# Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um felagið 2

Átekning leiðslunnar 3
Átekning frá óheftum grannskoðara 4

Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 5
Nýttar roknskaparreglur 5
Rakstrarroknskapur 7
Fíggjarstøða 8
Notur 9

# Upplýsingar um felagið

Føroya Symfoniorkestur
Postrúm 1170
110 Tórshavn

| | |
|---|---|
| Heimstaður: | Tórshavn |
| Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |

## Nevnd

Poul Jákup Thomsen, stjóri
Alex Sólstein
Bogi Lutzen

## Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f
Staravegur 17
100 Tórshavn

## Aðalfundur

Ársaðalfundur verður hildin eftir nærri áseting.

# Átekning leiðslunnar

Nevndin hevur í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin fyri 2017 fyri Føroya Symfoniorkestur.

Ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2017, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2017.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar ársaðalfundsins.

Tórshavn, hin 1. mars 2018

Nevnd:

| | | |
|---|---|---|
| Poul Jákup Thomsen<br>stjóri | Alex Sólstein | Bogi Lutzen |

# Átekning frá óheftum grannskoðara

## Til Føroya Symfoniorkestur

**Átekning á ársroknskapin**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Føroya Symfoniorkestur fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2017 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Nevndin hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Nevndin hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið starvsnevndin metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, herundir kunngerð nr. 125/2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan § 22, stk. 2 nr. 1-5. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2017 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2017 samsvarandi ársroknskaparlógini. Tað er somuleiðis okkara fatan, at tað eru settar á stovn mannagongdir og innanhýsis eftirlit, sum stuðla undir, at tær avgerðir, sum eru fevndar av ársroknskapinum, eru í tráð við givna játtan lógir og aðrar reguleringar og við gjørdar avtalur og vanliga siðvenju.

Tórshavn, hin 1. mars 2018

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2017

## Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Føroya Symfoniorkestur fyri 2017 er gjørdur eftir ásetingunum í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki A.

Nýttu roknskaparreglur eru óbroyttar í mun til undanfarna ár.

## Rakstrarroknskapurin

### Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Útreiðslur, nýttar til at røkka ársins inntøku, verða tiknar við í rakstrarroknskapin.

### Inntøkur

Stuðul verður inntøkuførdur í tí ári, hann er játtaður. Gávur og annar stuðul verður inntøkuført, so hvørt tað verður inngoldið. Inntøka frá atgongumerkjasølu verður inntøkuførd í tí ári, hon viðvíkur.

### Uttanhýsis kostnaður

Uttanhýsis kostnaður fevnir um fundar- og ferðakostnað, skrivstovuhald, ritbúnað og lýsingar vm.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um løn og samsýning umframt lønartrengdir kostnaðir.

### Útreiðslur

Útreiðslurnar verða útreiðsluførdar í tí ári tær viðvíkja.

### Fíggjarligar inntøkur og -útreiðslur

Fíggjarligar inntøkur og –útreiðslur fevna um rentur.

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2017

## Fíggjarstøðan

### Áogn

Áogn verður virðisásett itil amortiseraðan kostprís, sum svarar til áljóðandi virði, við frádrátti av væntaðum tapi.

### Onnur skuld

Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís svarandi til áljóðandi virðið.

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2017

## Rakstrarroknskapur

| | Nota | kr.<br>2017 | tkr.<br>2016 |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | 1 | 3.089.560 | 2.914 |
| Uttanhýsis kostnaður | 2 | -1.350.226 | -973 |
| Samsýningar | 3 | -1.188.935 | -983 |
| **Bruttovinningur** | | 550.399 | 958 |
| Starvsfólkakostnaður | 4 | -534.054 | -512 |
| **Úrslit áðrenn rentur v.m.** | | 16.345 | 446 |
| Aðrar fíggjarligar útreiðslur | | -2.011 | -14 |
| **Ársúrslit** | | 14.334 | 432 |

## Uppskot til yvirskotsbýti

| | | |
|---|---|---|
| Flutt úrslit | 14.334 | 432 |

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2017

## Fíggjarstøða 31. desember 2017

| OGN | Nota | kr. 2017 | tkr. 2016 |
|---|---|---|---|
| Onnur áogn | | 100.000 | 150 |
| Tíðaravmarkingar | | 105.722 | 4 |
| **Áogn** | | **205.722** | **154** |
| **Tøkur peningur** | | **108.699** | **180** |
| **Ogn í umferð til samans** | | **314.421** | **334** |
| **OGN TIL SAMANS** | | **314.421** | **334** |

| SKYLDUR | | | |
|---|---|---|---|
| Fluttur vinningur | | 101.277 | -331 |
| Flutt frá rakstri | | 14.334 | 432 |
| **Eginogn til samans** | | **115.611** | **101** |
| Ognarar | | 198.810 | 233 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **198.810** | **233** |
| **Skuld til samans** | | **198.810** | **233** |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | | **314.421** | **334** |

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2017

## Notur

| | | kr. 2017 | tkr. 2016 |
|---|---|---|---|
| 1 | **Inntøkur** | | |
| | Mentamálaráðið | 1.700.000 | 1.700 |
| | Norðurlandahúsið | 250.000 | 300 |
| | Tórshavnar Býráð | 225.000 | 225 |
| | Atgongumerkjasøla | 553.760 | 554 |
| | Kringvarp Føroya | 60.000 | 60 |
| | Føroya Kirkjugrunnur | 300.000 | 0 |
| | Annar stuðul | 800 | 75 |
| | **Inntøkur til samans** | **3.089.560** | **2.914** |
| 2 | **Uttanhýsis kostnaður** | | |
| | Tólbúnaður | 7.369 | 67 |
| | Ljóðføri, tilhoyr og nótakeyp | 292.557 | 92 |
| | Skrivstovuútgerð | 15.010 | 31 |
| | Telefon, internet vm | 15.228 | 25 |
| | Limagjøld | 0 | 1 |
| | Grannskoðan, roknskaparhjálp og bókhald | 90.250 | 15 |
| | Hølisleiga | 65.250 | 46 |
| | Blómur og gávur | 3.739 | 8 |
| | Ferðaútreiðslur, -endurgjøld og flutningskostnaður | 730.561 | 560 |
| | Kaffi, te, køkur vm | 59.881 | 77 |
| | Aðrir kostnaðir | 57.455 | 5 |
| | Lýsingar | 1.365 | 3 |
| | Upptøkur | 11.561 | 43 |
| | **Uttanhýsis kostnaður til samans** | **1.350.226** | **973** |

3 **Samsýningar**

Føroya Symfoniorkestur sendi á vári í 2017 fyrispurning til Taks viðvíkjandi útgoldnum samsýningum til tónleikarar, um hesar skulu rindast umvegis afturhaldsskipanina ella ikki. Eingin niðurstøða er komin frá Taks enn.

# Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2017

## Notur

| | | kr. 2017 | tkr. 2016 |
|---|---|---|---|
| 4 | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønarútreiðslur og samsýningar | 506.549 | 468 |
| | Eftirlønir | 14.814 | 9 |
| | Arbeiðsmarknaðargjøld | 12.691 | 35 |
| | **Starvsfólkakostnaður til samans** | **534.054** | **512** |